**Faroe Islands – Lists of low risk non-reporting FIs and excluded accounts**

**Kunngerð um eyðmerking og fráboðan av fíggjarkontum við tilknýti til útheimin**

**§ 19.** Við ávísar aðrar eftirlønarkassar o.a. er at skilja eindir í tann mun tær ikki eru fevndar av §§ 16-18:

1) Tvørgangandi eftirlønarkassar, sbrt. Bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed § 304, við sjálvstøðugum vinnurekand limum.

2) Lívstryggingarfeløg tengd at arbeiðsmarknaðinum, sbrt. bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed § 307.

3) Lívstryggingarfeløg, sum uppfylla treytirnar í bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed § 307, stk. 1, nr. 1 og 2.

4) Lívstryggingarfeløg, sum í fullan mun antin beinleiðis ella óbeinleiðis eru ogn hjá fakligu yrkisfelagum tryggingartakaranna saman við tvørgangandi eftirlønarkassum fevndir av bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed § 304, og sum bert hevur arbeiðsmarknaðareftirlønarskipanir.

*Stk. 2.* Eindirnar sum eru nevndar í stk. 1 verða almannakunngjørdar av TAKS á einum lista saman við teimum fíggjarligum kontum, sum eru nevndar í § 39.

**§ 39.** Eftirlønarskipanir fevndar av eftirlønarlógini verður roknaðar sum Kontur, sum eru undantiknar.

*Stk. 2.* Kontur sum eru nevndar í stk. 1 verða almannakunngjørdar av TAKS á einum lista saman við teimum Eindum, sum eru nevndar í § 19.